

# Týskarar eftir vindorku

Herfyri samtykti týska stjórnin at økja stuðulin til vindorku, og tað hevur av álvara sett ferð á vindorkuútbyggingina har. Serliga stórur er áhugin fyri at byggja vindmyllulundir á sjónum, og fyribils er úrslitið, at orkufeløg hava gjørt av at byggja 35 vindmyllulundir í Eystrasalti og Norðsjónum. Danmark er millum fremstu londini á vindorkuøkinum, og hesa vikuna eru týsku feløgini boðin á ráðstevnu í Esbjerg um samstarv í sambandi við útbyggingina.

*Danir ætla sær at fáa ágóða av týsku vindorkuætlanunum (Mynd: Polfoto)*

Rainbow Seafood:

# Litrík føroysk vakstrarfyritøka (gazella)



**Smápartafelagið Rainbow Seafood hevði í 2007 eitt avlop eftir skatt uppá 1,4 milliónir krónur og rentaði eginognina við 25%**

**ÁRSROKNSKAPUR**
*Business-line*
*www.bl.fo*

Tað gongur støðugt framá hjá fiskasølufyritøkuni Rainbow Seafood - fiskasølan við tí góða útsýninum yvir vestaru vág í Havn. Fyritøkan hevur seinastu 5-6 árini tikið sær av fiskasølu fyri bátar og skip og eigur ein lítlan triðing av partapeninginum fiskavirkinum P/F Bátafiskur á Eiði.

## Vaksandi bruttoúrtøka

Bruttovinningurin, tvs. úrslitið, ið er eftir til starvsfólk, fígging, avskriving og skatt er í farna árið økt við 12%. Hóast hetta, veksur nettoúrslitið ikki tilsvarandi, orsakað av øktum fíggjarútreiðslum.

## Vakstrarfyritøka (gazella)

Smápartafelagið Rainbow Seafood er ein av skjótast vaksandi fyritøkum í Føroyum og leyk í fjør altjóða treytirnar fyri at verða ein vakstrarfyritøka ella gazella. Treytin fyri hesum er m. a. at bruttovinningurin er vaksin við meira enn 100% tey seinastu fýra árini.

Árini 2003-2006 vaks bruttovinningurin hjá Sp/f Rainbow Seafood við ikki minni enn 356%!

Regin Mikkelsen er stjóri hjá Sp/f Rainbow Seafood, meðan Per Mikkelsen er nevndarformaður.

**SP/F RAINBOW SEAFOOD**

| Øll tøl í 1.000 kr. | | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Rakstur | | | |
| **Bruttovinningur:** | | **5,032** | **4,494** | **4,625** | **3,060** |
| Starvsfólkakostn.: | | 2,412 | 2,353 | 1,876 | 1,124 |
| Annar rakstrark.: | | - | - | - | - |
| Avskrivingar: | | 124 | 57 | 19 | 19 |
| **Úrslit áðrenn rentur:** | | **2,496** | **2,084** | **2,730** | **1,917** |
| Fíggjarligar innt.: | | 116 | 548 | 147 | 17 |
| Fíggjarligar útr.: | | 888 | 644 | 763 | 401 |
| **Úrslit áðrenn óv. p.:** | | **1,724** | **1,988** | **2,114** | **1,533** |
| Óvanligir póstar: | | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt:** | | **1,724** | **1,988** | **2,114** | **1,533** |
| Skattur: | | 328 | 358 | 425 | 308 |
| **Ársins úrslit:** | | **1,396** | **1,630** | **1,689** | **1,225** |
| | | Ogn | | | |
| Støðisogn: | | 2,268 | 417 | 179 | 158 |
| Ogn í umferð: | | 25,586 | 25,350 | 15,236 | 11,525 |
| **Ogn í alt:** | | **27,854** | **25,767** | **15,415** | **11,683** |
| | | Eginpeningur, avseting og skuld | | | |
| **Eginpeningur:** | | **6,816** | **5,220** | **3,590** | **1,710** |
| **Avsetingar:** | | - | - | - | - |
| Langfreista skuld: | | - | - | - | - |
| Stuttfreistað skuld: | | 21,038 | 20,547 | 11,825 | 9,973 |
| **Skuld íalt:** | | **21,038** | **20,547** | **11,825** | **9,973** |
| **Eginp., avs. og skuld:** | | **27,854** | **25,767** | **15,415** | **11,683** |
| | | Lønir | | | |
| **Løn til stjórn** | | 487 | 478 | | |
| **Løn til nevnd** | | | | | |
| | | Lyklatøl | | | |
| **Ognaravkast:** | | 9 | 8 | 18 | 16 |
| **Eginpeningsavkast:** | | 25 | 38 | 59 | 90 |
| **Soliditetur:** | | 24 | 20 | 23 | 15 |
| **Gjaldførisluttal:** | | 122 | 123 | 129 | 116 |

*Roknskapartøl frá www.business-line.fo*

# Veðurlags-kumpass til vinnulívið



**Alt ov fáar fyritøkur hava sett sær greið mál fyri, hvussu tær ætla at avmarka sítt CO2 útlát. Ein nýggj veðurlagskumpass á alnetinum skal hjálpa teimum á rætta kós**

**UMHVØRVI**
*Finnur Sivertsen,*
*Búskaparfrøðingur*
*bs@post.olivant.fo*
*Business-line*
*www.bl.fo*

Danskar fyritøkur skulu innan stóra veðurlagsfundin í Keypmannahavn í 2009 seta meira ferð á at avmarka sítt CO2 útlát. Í dag hava bert 17% av fyritøkunum, ið eru skrásettar á virðisbrævaskálanum, sett sær ítøkilig mál fyri, hvussu tær avmarka útlátið.

Tí hava danska Búskapar- og Vinnumálaráðið og Danska Arbeiðsgevarafelagið (DI) tikið stig til at stovna eina sokallaða veðurlagskumpass, sum skal vísa fyritøkunum á rætta kós í sambandi við CO2 útlát.

Hugskotið við hesi kumpass er, at fyritøkurnar kunnu útrokna sítt egna útlát av drívhúsgassi. Samstundis fáa fyritøkurnar hjálp til at meta um, hvussu tær avmarka útlátið, uttan at hetta tó ávirkar búskaparligu vakstrarmøguleikarnar hjá teimum.

- Danskar fyritøkur seta seg javnan í samband við Danska Arbeiðsgevarafelagið fyri at fáa ráðgeving til at seta sær realistisk mál fyri, hvussu útlátið kann avmarkast. Tí er vaksandi tørvur á einum amboðskassa, ið kann verða hesum fyritøkum til hjálpar, sigur Tine Roed, varastjóri í DI.

Hugskotið til at samstarva um eina verðurlagskumpass kom í samband við ein fund millum serligu veðurlagsnevndina hjá donskum stjórnini, danska vinnumálaráðharran, Bendt Bendtsen, vísindamálaráðharran, Helge Sander, veðurlags-og orkumálaráðharran, Connie Hedegaard og ráðharran í umhvørvismálum, Troels Lund Poulsen.